# Kjak

Mentamálaráðið

# Eitt betri Kringvarp og størri rúm fyri privatu fjølmiðlunum

*Hetta var høvuðsboðskapurin frá landsstýriskvinnuni í mentamálum, Helenu Dam á Neystabø, ið hevði boðið nývalda kringvarpsstýrinum, varalimum og kringvarpsstjóranum til ein kunnandi fund í Mentamálaráðnum seinnapartin fríggjadagin 14. januar 2011*

Stýrið hevur ovastu leiðsluna og yvirskipaðu ábyrgdina fyri Kringvarpinum, og varð hesin leiklutur gjøgnumgingin á fundinum. Við nýggju kringvarpslógini hevur landsstýrimaðurin ella landsstýrikvinnan latið sínar heimildir at stýra stovninum til stýrið – fyrst og fremst fyri at tryggja óheftni av politiska myndugleikanum. Tað liggur tí ein stór ábyrgd á kringvarpsstýrinum at vera við til at skipa so fyri, at kringvarpsstovnurin fær møguleika fyri at menna seg til tað, sum ætlanin upprunaliga var.

Landsstýriskvinnan nýtti eisini høvi at gera vart við nakrar av teimum avbjóðingum, sum liggja fyri framman:

### Public service-sáttmálin raðfestir føroyska málið, mentan og barna- og ungdómstilfar

Í fjør heyst varð okkara fyrsti public service-sáttmáli undirskrivaður. Og tað verður fremsta uppgávan hjá nýggja stýrinum at tryggja, at hesin sáttmáli verður fylgdur. At útinna Public service-sáttmála eftilit.

Í hesum fyrsta sáttmálanum verður dentur lagdur á at raðfesta mentan og barna- og ungdómstilfar. Eisini er stórur dentur lagdur á skyldur Kringvarpsins í mun til málið. Tað kann als ikki góðtakast, at almenni fjølmiðilin fer illa við málinum. Eisini er dentur lagdur á at útveita eitt vaksandi tal av sendingum.

### Aðrar skyldur

Hóast raðfestingarnar, skal Kringvarpið framhaldandi røkja allar tær vanligu public service skyldurnar, ið eru umrøddar í lógini eins væl og í sáttmálanum.

Landsstýriskvinnan minti á, at ein av lógarfestu skyldum kringvarpsins er at varðveita sendingar, sum eru og verða framleiddar. Tað er umráðandi, at vit sum skjótast fáa orðað eina ítøkiliga ætlan um, hvussu hesin týðandi mentanararvur verður varðveittur.

### Ikki nøktandi hølisumstøður hjá samanlagda Kringvarpsstovninum

Útvarpið og Kringvapið vórðu í 2005 lagdir saman í ein stovn, Kringvarp Føroya. Tá var ætlanin, at útbyggingar skuldu fremjast, soleiðis at samanlagdi stovnurin kundi húsast undir sama taki. Men higartil hevur rúm ikki verið fyri at gera hesar íløgur, og framvegis húsast útvarps- og sjónvarpsfólk í stóran mun hvør sær. Á fundinum varð ført fram, at fyri at fáa størri nyttu burturúr samanleggingini og harvið eitt betri kringvarp, er neyðugt at stovnurin flytir saman.

### Vantandi inntøkur og niðurlaging av lýsingarinntøkum

Í kringvarpslógini verður Kringvarpinum heimilað "at fíggja virksemið við kringvarpsgjaldi, kunngerðar- og lýsingarinntøkum, sponsorering og øðrum virksemi, sum er knýtt at uppgávum stovnsins. Kringvarpið hevur loyvi at skipa fyri inntøkugevandi eydnuspølum. Men loyvt er ikki at lýsa á netmiðlunum". Í viðmerkingunum verður ført fram, at í eitt fimm ára skeið skulu lýsingarinntøkur Kringvarpsins niðurlagast – og landið skal útvega aðrar inntøkur í staðin. - Hetta lyftið varð givið við atliti at livikorum privatu miðlanna.

Tað hevur ikki higartil verið møguligt at finna politiska semju um at halda hesi lyftir, at niðurlaga lýsingarinntøkurnar og samstundis útvega Kringvarpinum aðrar inntøkur.

### Fjølmiðlakommissjón skal m.a. endurskoða fígging av kringvarpsgjaldinum

Kringvarpsgjaldið hevur verið óbroytt síðani 2004, og samanumtikið er fíggjarliga grundarlagið undir Kringvarpi Føroya og hinum føroysku fjølmiðlunum viknað. Á fundinum kunnaði landsstýriskvinnan um, at hon í næstum fer at seta eina fjølmiðlakommissjón, sum skal lýsa støðuna gjølllari og royna at finna fram til aðrar møguligar loysnir í framtíðini. Nevndin skal m.a. svara spurningunum:

- um kringvarpsbygnaðurin skal vera, sum hann er,
- um Kringvarpið skal fíggjast øðrvísi í framtíðini, samstundis sum vit tryggja eitt úrval av privatum fjølmiðlum,
- og um vit skulu velja ein annan leist at veita Føroya fólki neyðugar public service-tænastur.

### Siðvenjur broytast, so størri rúm verður fyri øllum miðlunum

Landsstýriskvinnan helt, at, óheft av hesum arbeiði, mugu samstarv og siðvenjur byggjast upp, ið tryggja, at rúm verður fyri bæði privatum fjølmiðlum umframt tí almenna kringvarpinum. Tað merkir, at partarnir virða hvønn annan á ein tílíkan hátt, at tað ikki verður eitt endamál í sjálvum sær, at taka breyðið úr munninum á hvørjum øðrum. Tað tykist hava verið ein tendensur til, at hevur annar loftborni miðilin funnið eitt koncept, sum riggar, so hermir hin rættiliga skjótt. Tað kann ikki vera endamálið, at alment fíggjaði miðilin tekur lut í tílíkari kapping.

"Tað má og skal vera atlitini til public service skyldurnar, sum eru avgerðandi fyri raðfestingarnar hjá Kringvarpinum. Tað er umráðandi, at Kringvarpið raðfestir dygd, dirvi, og debatt fram um nøgd og main-stream."

---



**Helgi Abrahamsen**
*løgtingsmaður*

# Spurningur til Kristoffur Gaardlykke

Kristoffur Gaardlykke, sum onkuntíð hevur verið á tingi, sum varamaður fyri Javnaðarflokkin, hevði fyrr í vikuni eina grein á Vágaportalinum, har hann viðgjørdi Eik málið. Í greinini legði hann serliga eftir Sambandsflokkinum og segði millum annað, at flokkurin í síni tíð hevði verið ímóti "okkara tjóðar flogfelag."

Henda pástandin havi eg ofta sæð og hoyrt, og havi eisini fleiri ferðir spurt tey, ið hava ført hann fram, hvat tey ítøkiliga meina við, men svar kemur einki. Tað er bara ein pástandur, ið eftir øllum at døma skal endurtakast ofta.

Eg havi leitað í Løgtingstíðindum, og har sæst, at tá partafelagið Atlantic Airways varð sett á stovn í 1987, varð lógaruppskot lagt fyri tingið, har biðið varð um heimild til at seta 1,02 mió. krónur í partapeningi í felagið. Hesum tók Sambandsflokkurin undir við. Minnilutin í fíggjarnevndini, (Ivan Johannesen, Anfinn Kallsberg og Eyðun Viderø) skrivaði millum annað soleiðis í teirra áliti: "Minnilutin gongur inn fyri, at føroyingar koma upp í flúgvingina."

Í mars 1989 varð biðið um landskassaveðhald á 75 mió. krónur til P/F Atlantic Airways. Tað málið varð, eins og hitt fyrra, beint í fíggjarnevndina, og 30. mars sama ár skrivaði nevndin álit, har ein samd nevnd (íroknað Flemming Mikkelsen úr Sambandsflokkinum) mælti tinginum til at samtykkja uppskotið, við onkrum broytingum.

Eg fari tí at biðja Kristoffur Gaardlykke koma við teimum upplýsingunum, sum hann leggur til grund fyri sínum pástandi, men sum ikki síggjast í Løgtingstíðindum.

### Eik málið

Tá ið Kristoffur soleiðis í eini grein, sum viðgerð Eik málið, nevnir hvat Sambandsflokkurin hevur verið ímóti í farnum tíðum, so fellir tað í eyguni, at hann ikki nevnir, at Sambandsflokkurin var ímóti at yvirtaka fíggjareftirlitið og innskjótaratrygdargrunnin. Tað fekk nevniliga sera stóran týdning í sambandi við Eik málið, at hesi mál ikki vórðu yvirtikin.

Kristoffur sigur, at sambandsmenn koma nú korpp av kroppi og taka sær æruna av, at vit fingu eina góða loysn á Eik kreppuni. Har haldi eg, at hann hevur lisið greinarnar illa. Vit siga nevniliga ikki, at vit einsamøll eiga æruna, men vit vísa á fyrimunirnar, sum ríkisfelagsskapurin hevur givið okkum. Men tá tað er sagt, so tekst ikki burtur, at Sambandsflokkurin er framsti garantur fyri ríkisfelagssakpinum.